*Lagt til rættis: Dorit Hansen og Rigmor Dam*

**Ítøkiligar staðfestar avleiðingar av veðurlagsbroytingum**

- Kavin og ísurin í Arktis bráðnar skjótari, og ávirkar hetta beinleiðis natúrligu vistskipanirnar
- Árstíðirnar byrja fyrr. Hetta sæst millum annað á nøgdini av blómusáði í luftini
- Jarðarlagið er leysari í fjallalendi og í økjum við permafrosti
- Tað eru fleiri skriðu- og skalvalop í fjallalendum
- Broytingar eru í flora og fauna í Arktis og Antarktis
- Kavin tiðnar fyrri, og elvir til vatnmangul seinni á árinum
- Ein upphiting er farin fram av áum og vøtnum, sum ávirka vatngóðskuna
- Leyspretting, fuglaflyting og verping eru eisini framskundað
- Gróður og djóralív flyta seg móti póløkini og upp í hægri landsløg
- Drúgvari vakstrartíðarskeið hevur eisini við sær meira CO2 í loftrúmið, sum aftur hevur við sær meiri plantuvøkstur
- Broytingar í hitanum í havinum saman við broytingum í ísløgum og javnváganum millum salt og súrevni hava eisini við sær broytingar í algu-, æti- og fiskanøgdum í havøkjum í norðara parti av heiminum
- Fólk doyggja vegna hita í Europa
- Ávísar smittandi sjúkur gera meira um seg

# Ávaring: Veðurlagið broytist

**Í 1988 setti ST á stovn eitt millumtjóða veðurlagspanel, IPCC. Fýra frágreiðingar eru útgivnar, tann seinasta í 2007. Her er eitt yvirlit yvir tær týdningarmestu niðurstøðurnar frá hesari frágreiðing**

Niðurstøðan í ST-frágreiðingini er greið: Skaðiligu evnini, sum vit menniskju lata út í loftrúmið, eru orsøkin til nógvu veðurlagsbroytingarnar. Til ber at tálma gongdini, um farið verður til verka nú. Sostatt liggur tann spurningurin ikki í buktini longur.

Síðani fyrstu frágreiðingina frá IPCC í 2001 eru stór framstig hend í mun útrokningina av framtíðar veðurlagsbroytingum. Hetta bæði tí, at fleiri veðurlagsmodellir og fleiri kanningar eru tøkar.

Fleiri túsund granskarar eru við í frágreiðingini, sum varð almannakunngjørd síðst í januar í 2007.

## Hitin ger um seg

Miðalhitin á jørðini er hækkaður við 0,74°C seinastu hundrað árini. Og tað eru serliga tey seinastu árini, at hitin er hækkaður nógv. 11 tey heitastu árini síðani hitamátingar byrjaðu í 19. øld eru skrásett innanfyri tey seinastu 12 árini.

Eisini er staðfest, at ísur bráðnar og havið er hækkað við 17 centimetrum í 20. øld. Eisini her er vøksturin størstur tey seinastu árini, har vatnstøðan er hækkað við 3,1 millimetri um árið seinastu 10 árini. Arktiski havísurin er minkaður við 20 prosentum síðani 1978.

Mongdin av avfallið er eisini broytt. Onkrastaðni er avfallið økt, meðan turkur er vorðin meira umfatandi aðra staðni. Men ikki alt er broytt. Til dømis er munurin millum dag- og náttarhita ikki broyttur, og havísurin og veðurlagið við Antarktis tykjast heldur ikki at vera serliga nógv ávirkað.

Mesta upphitingin er har, sum land er, umframt á norðastu leiðunum. Minsta upphitingin er yvir Suðurhøvini og partar av Norðuratlantshavinum. Í arktisku økjunum minkar kavanøgdin, og har permafrostur er, tiðnar ísurin. Summar framrokningar spáa, at ísurin í Arktis nærum tiðnar heilt burtur summarhálvuna.

## Náttúran ella menniskjan

Upphitining er eitt úrslit av øktum vakstrarhúsgassi og aerosoldusti í atmosferu, sólarljósi og jarðarskorpu. Hetta er aftur eitt úrslit av, at kuldioxid, metan og láturgass er hækkað munandi síðani 1750.

Vøksturin í koltvíiltu stavar millum annað frá nýtslu av steinrunnum brenni – kol, olju og natúrgassi, meðan vøksturin í metan og láturgassi serliga stavar frá landbúnaði.

IPPC frágreiðingin sigur, at tað er meiri enn sannlíkt, at økta upphitingin síðani mitt í 20. øld stavar frá menniskjaskaptum útláti av vakstrarhúsgassi, og at hesar broytingar ganga skjótari enn fyrst hildið.

Millum 1970 og 2004 hækkaði samlaða útlátið av vakstrarhúsgassum við 70 prosentum. Verða politisk tiltøk ikki sett í verk, verður roknað við, at hetta talið hækkar við 25-90 prosentum í 2030 í mun til 2000.

Um útlátið av vakstrarhúsgassum og aerosol dusti ikki fer upp um tað, sum tað var í ár 2000, so verður vøksturin hildin niðri á 0,1°C fyri hvørt tíggjunda ár. Men um útlátið ikki verður tálmað, verður hitavøksturin dupult so stórur. Og tá verða veðurlagsbroytingarnar í 21. øld enn størri enn broytingarnar í 20. øld.

## Vatnstøða og havstreymar

Vakstrarhúsútlátini ávirka eisini vatnstøðuna á høvunum. Um væl stendur til, og útlátið av vakstrarhúsgassum ikki veksur, vísa framrokningar, at havið fer at hækka við 18 centimetrum í 2090-2099. Men um vøksturin í útláti heldur fram sum higartil, kann havið hækka við upp til 59 cm.

Verður núverandi gongd framroknað enn longur inn í framtíðina, kann innlandsísurin hvørva og havið hækka upp í 7 metrar. Modelútrokningar vísa tó, at ísurin á suðurpólinum hinvegin kann vaksa, tí veðurlagið har ikki broytist, meðan avfallið veksur.

Vandin fyri tí óvæntaða, sum til dømis, at Golfstreymurin minkar burtur ella kúvendir, er eisini viðgjørdur í frágreiðingini.

